## Magni spælir neyvan aftur

Ein av grundstuðlunum undir góðu gongdini hjá GÍ ár hevur verið Magni Jarnskor. Fyrrverandi miðvallarmotorurin hevur í ár røkt vinstra bakkpláss, og fyri tað mesta hevur hetta verið loyst til UG. Tí var tað dyggur smeitur, tá Magni leygardagin noyddist av vølli við skaða. Sami skaði helt honum uttan fyri móti B36 seinast, men hesa ferð gjørdi hann royndina.

Sum skilst, so er talan um skaða í hælsinuni, og í Gøtu siga tey seg ivast í, hvørt veteranurin yvir høvur verður førur fyri at spæla aftur í ár.

**-mørk**



## Liverpool vann byrjanina

Kappingarárið í Onglandi byrjaði sunnudagin við sonevnda Community Shield. Hetta er dysturin millum meistarar og steypavinnarar, og hesa ferð eydnaðist Liverpool at basa Chelsea. John Arne Riise legði Liverpool á odda tíðliga í dystinum. Nýggi áleyparin hjá Chelsea, Andriy Shevchenko, javnaði eftir steðgin, og fleiri ferðir var hann eisini nær við at leggja meistararnar framum. Men Liverpool fekk tó seinasta orðið, tá Peter Crouch kundi beina innlegg frá Craig Bellamy í netið til endaligu støðuna, 2-1.

**-mørk**

VB/Sumba-GÍ 0-0:

# Vandaleyst álopsspæl

VB/S

GÍ

**Vertirnir áttu tveir stórar møguleikar fyri steðgin, men annars var lítið bit í, tá VB/Sumba fyri fyrstu ferð í ár helt málið reint.**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað tóktist vera lítil ivi um, hvør fremsti setningurin hjá fyribils settu venjarunum hjá VB/Sumba var leygardagin. Í 18 dystum hevði enn ikki eydnast suðuroyingunum at halda máið reint, og tí vóru boðini fyrst og fremst, at verjan skuldi standa rætt.

Hetta eydnaðist eisini móti einum GÍ-liði, sum nú ikki hevur vunnið ein fótbóltsdyst, síðani teir tann 16. juni løgdu seg á odda í Formula-deildini við einum sigri á HB.

### Ov nógv upp á Gunnar

At GÍ ikki hevur vunnið síðani, kunnu tað sjálvandi vera nógvar orsøkir til. Ein teirra er tó heilt víst, at mótstøðuliðini nú aftur hava fingið ta virðing fyri GÍ, sum var gerandiskostur fyri fáum árum síðani. Uppskriftin hjá liðnum hevur í ár verið at liggja aftarliga á vøllinum, fyri síðani at seta ferðina langt upp, tá bólturin er vunnin, men hetta hevði VB/Sumba lúrt av undan dystinum.

Fyrst og fremst, so vágaði heimaliðið ikki alt ov nógv fram eftir vøllinum, og tí fekk GÍ sjáldan høvi at seta kviku mótálopini ígongd. Ístaðin vóru tað teir, sum høvdu bóltin nógv meira, men tá tað ráddi um at skapa møguleikar, var mangan mest sum turrgelt.

Hartil hevði VB/Sumba við at seta Dmitri Jankovic á Gunnar Nielsen skert álopsspælið hjá gestunum í stóran mun. Aloftast er Gunnar maðurin, sum skal skapa kreativitetin hjá GÍ, og tann leiklutin megnaði hann ikki at liva upp til leygardagin.



*Gøtumenn tykjast veruliga uppsteðgaðir, og nú eru tveir mánaðir síðani, at teir seinast fóru av vøllinum við øllum stigunum*

*savnsmynd*

Ístaðin var tað VB/Sumba, sum var nærmast við at skora. Tvær ferðir høvdu teir stórar møguleikar, men í báðum førum bjargaði trævierkið gestunum, og so spurdist ikki meira burturúr.

### Flyta seg rætta vegin

Stigið leygardagin ber við sær, at VB/Sumba spakuliga er í ferð við at førka seg úr botninum. Enn sum áður eru tað dystirnir móti ÍF og B68, sum verða avgerandi fyri lagnuna, men sum støðan er í dag, er VB/Sumba at kalla ein dyst framman fyri í so máta.

Um venjaraskiftið er orsøkin, skulu vit lata vera ósagt. Men nullið, sum liðið hesa ferð helt, er tað fyrsta av slagnum í ár, og tað er ein ævigur sannleiki í fótbólti, at eitt gott lið tekur útgangsstøði í verjupartinum. Var dysturin leygardagin eitt úttrykk fyri hetta, so boðar tað í øllum førum fyri góðum hjá suðuroyingunum.

Hjá GÍ var javnleikurin enn eitt av fleiri úrslitunum, sum tykist flyta GÍ longur og longur frá toppinum. Har er málið annars aftur í ár at vinna seg upp á Europiskt pláss, men skal hetta henda, mugu sigrar skjótt á

## 70 børn á fimleikaskúla á Hálsi

**Leygardagin vóru 70 børn til fimleikadag í ítróttarhøllini á Hálsi. Tað var fimleikasamband Føroya, sum skipaði fyri degnum. Tiltakið er ein liður í at økja um áhugan fyri fimleiki millum børnini**

FIMLEIKUR
*Heini S. Kristiansen*

Sámal T. F. Johansen og Óluva Zachariassen skipaðu fyri fimleikaskúlanum, sum var fyri børn frá 1. til 5. flokk. Tey eru við í reiðskapsnevndini hjá fimleikasambandinum. Venjararnir hendan dagin vóru nakrir av teimum bestu fimleikarunum í reiðskapsfimleiki í landinum, millum annað Høgni Øster og Rúni Lamhauge.

Fimleikasambandið vil fegin gera vart við fimleikin, og hetta er ein liður í at hækka støðið á fimleikinum á landinum.

– Vit vilja fegin vera meira kappingarfør, tá ið vit fara til altjóða kappingar. Sum nú er, eru okkara grannalond nøkur støði yvir okkum. Vit mugu byrja longu við børnunum, sigur Óluva Zachariassen.

50 gentir og 20 dreingir luttøku á fimleikaskúlanum.

– Vit vilja fegin hava fleiri dreingir til at gera fimleik, men tað er ikki so lætt. Í dag er so stór kapping millum ítróttargreinarnar, at børnini mugu velja longu sum ung, sigur Sámal T. F. Johansen.



*Nógv varð lagt fyri, tá Fimleikasambandið leygardagin skipaði fyri fimleikaskúla*

*Mynd: Álvur*

ÍF-NSÍ 1-3 (0-2):

# Dýrt keyptur sigur

ÍF

NSÍ

**Runavíkingar vunnu ætlaðu sigurin, men tað kom illa við, at Jens Martin Knudsen fekk reytt kort móti dystarenda**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Runavíkingar eru enn við í FM-stríðnum. Tað staðfestu vespurnar, tá teir vitjaðu í Fuglafirði leygardagin.

NSÍ var frá byrjan betra liðið, og teir byrjaðu eisini væl, tá Helgi L. Petersen rættiliga skjótt legði gestirnar á odda. ÍF var í longum løtum um ein háls hesa løtuna, og tó at yvirvágin hevði hug at flata út, so var sjáldan ivi um, hvat var betra liðið.

2-0 gjørdist tað, tá Christian Høgni Jacobsen enn einaferð staðfesti, hvussu vandamikil hann er. Hesa ferð var málið eitt gott dømi um, at ein áleypari við viðráki er serstakliga vandamikil. Landsliðsmaðurin vann eina tackling, og áðrenn nakran vardi meddaði hann bóltin í meskarnar.

Eftir steðgin tók NSÍ so longur aftur, og tað gav fuglfirðingum bóltin meira. Vertirnir royndu eisini at trýsta, og so hendi tað, sum so ofta hendir. ÍF misti í álopsroynd, og so gekk skjótt hinvegin. Endin varð, at Óli Hansen stóð púrasta blankur, og tað takkaði hann fyri.

At ÍF kortini fekk minkað, mundi ikki bila so nógv fyri runavíkingarnar, men tað nívdi nógv, at reytt kort samstundis fylgdi við. Jens Martin Knudsen og Bartal Eliasen vóru í hornatøkum, tá dómarin metti Jens Martin hava hevnt seg. Reytt kort til Jens Martin og brotsspark til ÍF, sum Bartal fyri aðru ferð á rað sendi beint í meskarnar handan Einar Hansen, sum varð settur av bakkinum í málið.

Við einum manni í yvirtali royndi ÍF at trýsta seinastu løtuna, men tað gav sjáldan nakrar ítøkiligar møguleikar. Teir eru framvegis at finna í botninum, meðan NSÍ spakuliga kann fara at droyma gyltar dreymar.

Men teir mugu so droymast uttan Jens Martin Knudsen, sum við vissu ikki verður við, tá NSÍ spælir móti HB næstu ferð. Og tað kann væl vera, at veteranurin í málinum heldur ikki er tøkur, tá B36 er mótstøðuliðið í Gundadali annan mikudag.